# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Gulir dagar í Havn




Í døgunum 14. til 16. apríl verður ein stór framsýning við Hoyvíksvegin í Havn, tá Mekonomen fær vitjan av fleiri av sínum veitarum úr Danmark. Fyrstu tveir dagarnar er framsýning bert fyri verkstaðskundar, meðan opið er fyri almenninginum leygardagin. Framsýningin verður á økinum við handilsbygningin hjá Mekonomen við Hoyvíksvegin 61.

Petur Martin Johansen, stjóri í Mekonomen í Føroyum, sigur, at teir við hesi framsýning vilja koma nærri kundunum, bæði verkstøðum og privatu kundunum. Á framsýningini verður nógv ymiskt sýnt fram sum t.d. Compac-gearkassalyftarar, Facom-luftlyklar, Stenhøj-lyftarar, Bosch-motortestarar og Nilfisk-kaltvatnsreinsarar. Umframt hópin av øðrum produktum og nýggjheitum frá hesum veitarum.

Mekonomen er størsta heilsøla í Skandinavia við 225 handlum og er fimtistørsti innkeypari av eykalutum í Evropa við 400.000 vørunumrum í síni vøruskrá. Mekonomen er eisini størsta verkstaðsketa í Skandinavia við yvir 1.300 verkstøðum. Í Mekonomen samtakinum eru meira enn 10.000 starvsfólk. Mekonomen setur serlig krøv til góðsku og veitir trý ára garanti upp á allar nýggjar vørur.

Høvi verður hjá verkstøðum at vitja framsýningina hósdagin 14. og fríggjadagin 15. apríl, báðar dagarnar frá kl. 14 – 20, og leygardagin er framsýningin opin fyri almenninginum frá kl. 10 - 17.

*Heini Haubro, sølustjóri hjá Mekonomen, og Petur Martin Johansen, stjóri hjá Mekonomen í Føroyum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



# Fyrsta servicestøðin til elbilar

Týsdagin 12. april letur fyrsta servicestøðin hjá ChoosEV til elbilar upp í Keypmannahavn. Tað verður klima- og orkumálaráðharrin Lykke Friis, sum alment letur støðina upp. Talan er um eina QuickCharge-løðistøð, har tað bert tekur 20 min. at løða ein elbil, so hann kann koyra næstu 100 kilometrarnar.

Danska elbilafyritøkan ChoosEV eigur og rekur støðina. Málið hjá ChoosEV er at vera leiðandi á danska marknaðinum innan infrastruktur til elbilar.

*mg*

Hósdagin 14. apríl kl. 16.10

Í sendingini verður ymiskt á skránni m.a. verður vitjað á eini framsýning hjá Mekonomen við Hoyvíksvegin í Havn har samrøður eru við Heina Haubro og Pernille Vestergaard frá Mekonomen í Danmark og við Petur Martin Johansen, stjóra hjá Mekonomen í Føroyum.



Petur Martin Johansen



Heini Haubro

Vinnu- & bílradio á Rás 2